ÍF-HB 0-2 (0-1):

# Ræddir fuglfirðingar

**Tað var ikki fyrr enn eftir steðgin, at ÍF tveitti ovurstóru virðingina fyri borð, men tá hevði HB fyrimunin, og teir megnaðu eisini at staðfesta hendan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki frítt, at fótbóltshýrurin í Fuglafirði er fyri uppgangandi. Eftir at ÍF í fjør spældi seg upp aftur í bestu deildina, hava teir í ár sýnt spennandi taktir í steypakappingini, og hóast landskappingin ikki hevur givið eins góð úrslit, so tykjast vónirnar kring øllin framvegis at vera stórar. Nakað sum eisini endurspeglaðist í uppmøtingini, nú meistararnir úr HB komu á vitjan Kristi himmalferðardag.



*Við einum ektaðum centerforward-málið sløkti Heine Fernandez alla vón hjá fuglfirðingum, tá teir annars vóru við at arbeiða seg aftur í dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Ovurstór virðing

Men stóran part av fyrra hálvleiki máttu vónríku heimaáskoðararnir smyrja seg við, at hetta við at hitta meistararnar var ein ov stórur gloypibiti. Hóast eina optimistiska byrjan, har fuglfirðingarnir royndu at vera við til at mynda dystin, so gekk tað alt meira tann vegin, at talan gjørdist um eitt einvíst HB-trýst. Eftir fyrsta korterið ella har á leið fall heimaliðið alt ov langt aftur á vøllin, soleiðis at Bartal og Magni – tá hesir vóru frammi í álopinum – vóru alt ov einsamallir, og tí fekk HB at kalla hvørja ferð fatur í returbóltunum, soleiðis at nýtt álop kundi byrja.

Tað gekk tó leingi, áðrenn HB fekk nakran veruligan møguleika burturúr yvirvágini. Eitt skjótt tikið innkast, tá ÍF-verjan snorksvav, tóktist vera tað nærmasta, men ta ferðina stórbjargaði Karsten Joensen royndini frá leysa Rúna Nolsøe.

Tað tóktist tó greitt, at tað fyrr ella seinni fór at kasta mál av sær, og stutt undan steðginum fekk HB so forloysingina. Fyrst brakaði Heðin á Lakjuni eitt dundurskot á undirsíðuna av tvørtrænum, og Rógvi Jacobsen so sendi returin innaftur, kundi Rúni við høvdinum bera í bøtuflaka fyri misnýtta risamøguleikan.

Tað skal tó eisini nevnast, at umframt spakliga ÍF-spælið, so arbeiddu gestirnir í sínum lagi sera væl. Serstakliga sótu markeringarnar tætt á miðvøllinum, soleiðis at ÍF lítið og einki hevði at geva av, og á hendan hátt fekk HB tað trýstið báðar vegir, sum teir hava havt so stórt gagn av seinnu árini.

### Vertirnir mentust

Eftir steðgin broyttist spælbýtið. HB tók seg nakað meira aftur á vøllin, nú teir høvdu eina leiðslu at verja, og hetta gav líka sum fuglfirðingum trúnna uppá, at teir kundu vera við til at mynda dystin.

Teir fluttu nú eisini meira fólk fram á vøllin, og tó at opnu málmøguleikarnir vóru fáir, so bylgjaði dysturin meira aftur og fram.

Serliga tóktist HB verjan at koma undir trýst, tá tað eydnaðist fuglfirðingunum at koma ígjøgnum í síðunum, soleiðis at bóltar kundu sendast móti høvdinum á Bartali, og tað var júst eftir slíkt uppspæl, at ÍF fekk sín størsta møguleika. Bartal fekk við høvdinum stýrt bóltinum móti handaru stong til ein púra leysan Bárð á Lakjuni, men Pól kom væl út úr málinum, soleiðis at hálvfluktarin hjá Bárði kom í krovið á málverjanum.

Heilt so væl stóð Pól seg ikki nakað seinni, tá ÍF átti fríspark í høgru. Áki Petersen sendi innfyri, og HB'arni mundu halda vandan vera av, tá Pól rópti eitt hart »havi«. Málverjin hevði tó mistikið seg fullkomuliga, og hann mundi draga andan nakað nógv lættari, tá bólturin tók í handaru stong fyri síðani at fara út aftur í spælið.

### Heine punkteraði dystin

Vertirnir mundu nú kenna á sær, at eitt útjavnandi mál als ikki var ómøguligt, men so var tað, at HB sýndi eginleikararnar hjá stóru liðunum. Talan var um misskiljing millum verju á málmann, tá Rógvi Jacobsen slapp ímillum, so hann kundi prika bóltin fram við málverjanum, har ein púra leysur Heine Fernandez kundi rulla í tóma málið.

Hetta punkteraði endaliga dystin, og tó at ÍF aftur royndi at trýsta, so gjørdist tað sjáldan til meira enn eina hálvhjartaða roynd. Ein hampuliga stóran møguleika høvdu teir í seinastu minuttunum av yvirtíðini, men sum so kundi tað gera tað sama, um hesin fór inn ella ikki. Stigini høvdu kortini farið til Havnar. Fyrst og fremst tí HB í nógv størri mun sýndi dygdirnar, sum eitt oddalið skal hava, og tí at fuglfirðingarnir í ov langa tíð tóktust mest sum imponeraðir av stóru mótstøðuni.

## Fakta um dystin

**ÍF-HB 0-2 (0-1)**
0-1: Rúni Nolsøe, 43
0-2: Heine Fernandez, 76.

ÍF: Karstin Joensen – Árni Petersen (Torstein Joensen, 78.), Viggo Johannesen, Áki Petersen, Rúni Elttør, Eyðolvur Petersen, Roy Róin (Bárður á Lakjuni, 46.), Fritleif í Lambanum, Hanus Eliasen (Høgni Zacariasen, 46.) – Magni á Lakjuni, Bartal Eliasen
Gul kort: Firtleif í Lambanum, 37., Rúni Elttør, 90.
HB: Pól N. Joensen – Hallur Danielsen, Vagnur M. Mortensen, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Rókur F. Jespersen (Hans á Lag, 80.), Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Kári Nielsen – Heine Fernandez, Heðin á Lakjuni
Gul kort: Janus Joensen, 76.
Dómari: Suni Johansen: Tóktist alla tíðina at hava gott tamarhald á, og sæð burtur frá einum sera bíligum gulum korti til Rúna Elttør, var lítið og einki at finnast at.

## Øll telja líka nógv



Hóast spælið kanska ikki var av tí allarbesta, so tóktist hetta á ongan hátt at taka gleðina um sigurin frá Heðini á Lakjuni, sum aftur hesaferð var partur av HB-álopinum.

– Tað eru jú stigini sum telja, so tað var tað týdningarmesta. Annars haldi eg, at vit spæla ein rímiligan fyrra hálvleik, har vit hava eitt gott trýst á teimum. Seinna hálvleik var skilið ikki so gott, og teir fáa eisini onkran møguleika, men tíbetur, so megna vit at avgera.

Júst tað málið tóktist annars eitt sindur kloddur hjá heimaliðnum, men eisini tað var Heðin púra kaldur yvirfyri.

– Tað er nokk ein misskiljing, har Rógvi kemur ímillum, men hvat. Tað telir eins nógv og øll onnur mál.

Og við sigrinum tykist HB av álvara at hava lagt seg út í oddastríðið. Eitt oddastríð, har teir annars høvdu ilt við at vinna fram fyrstu umførini.

Eru tit nú av álvara farnir at trúgva upp á møguleikan aftur?

– Vit hava so ongantíð mist trúnna uppá, at tað skal bera til. Vit hava tikið ein dyst í senn, og tað gera vit framvegis. Stigini skulu nokk fara at koma, eri eg sannførdur um.

**-jm**

## Ov bangnir



ÍF-venjarin, Sigfríður Clementsen, var á ongan hátt ósamdur, tá vit eftir dystin spurdu hann, um virðingin hjá hansara monnum fyri HB ikki hevði verið ov stór.

– Jú, tað var. Serliga í fyrra hálvleiki. Eg haldi annars, at vit eru væl við fyrstu 20 minuttirnar ella so, men so fellur alt liðið aftur á vøllin, soleiðis at teir fáa alt ov góðar treytir.

– Vit royna so at bøta um tað í steðginum, og eg haldi eisini, at vit eftir hetta eru munandi betri við. Vit skapa so eisini nakrar møguleikar, men tá vit so ikki gera nyttu úr hesum, verða vit revsaðir. Og so er tað sjálvandi typiskt, at tað hendir beint eftir, at vit hava havt okkara besta møguleika.

Undan kappingini roknaðu fleiri við, at ÍF fór at ota seg nakað upp á talvuni. Nú fýra umfør eru leikt, eru bert trý stig fingin til høldar, men hetta tykist tó ikki vera nakað, sum nervar venjaran.

– Vit royna at koyra á, tað sm vit eru mentir. Í seinna hálvleiki í dag var innsatsurin í øllum førum heilhjartaður, og tað mugu vit halda fast um, var einasta viðmerkingin, sum venjarin hevði til hetta seinasta.

**-jm**



B68-Skála 0-4 (0-2):

# Tað var stórur munur á



*Bogi hevur aftur skorað, og fagnaðurin á liðfeløgunum er stórur. Tað hava teir eisini alla orsøk til á Skála, sum nú eftir fýra umfør hevur lagt seg einsamalt á odda*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Meðan skálamenn við 4-0 sigrinum á Svangaskarði vístu hugflog og stóra spæligleði, hekk tað ikki væl saman hjá illa sperdu toftamonnunum**

B68-SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Tað var ikki ilt at síggja, hvør tað var, sum er í toppinum, og hvør tað er, sum hevur heilt annað at hugsa um. Tað eru nýggjar fótbóltstíðir. Bæði á Toftum og á Skála. Mótsatt síðsta sunnudag, tá ið B68 í Runavík var óheppið ikki at fáa stig burturúr, tí spælið hekk hampuliga væl saman, og tí teir komu til málmøguleikar, so hekk tað ikki saman ímóti Skála, og toftamenn høvdu so at siga ongar málmøguleikar. Tað var lítil ella eingin broddur og tyngd í, og tað var bert hendingaferðina, at teir fingu lagt innfyri, uttan at nakað spurdist burturúr.

Hjá B68 var tað steinur oman á byrði, at tveir spælarar noyddust at taka seg aftur, tí teir vóru skaddir. Mikkjal Thomassen, sum sunnudagin vísti, at venjingarstøðan er nógv batnað, men sum ikki hevði verið so eyðsýndur hesa ferð, noyddist at fara av vøllinum síðst í 1. hálvleiki, og Bogi Petersen, sum hevur verið rættuliga drúgvur í ár, noyddist at taka seg aftur, tá ið tað væl og virðiliga var greitt, at Skála fór at vinna.

Øssur Hansen og Jákup Eli Olsen royndu í vinstru, og Jóhan Petur Poulsen var onkra ferðina um reppið at gerast leysur, men síðsta tíman hevði B68 ikki nakra nevni verduga roynd ímóti málinum hjá Igor Kostic, sum ikki hevði høvi at vísa, at tað er størri dugur í honum, enn hann vísti, tá ið ÍF vitjaði á Skála.

### Skil í tingunum

Hjá Skála gongur tað við rúkandi ferð rætta vegin. Tað var ikki alla tíðina so hugflogsríkt og væl skipað á Svangaskarði, men tað var í ríkt mál nóg mikið til at vinna.

Heilt sjónskt var tað, at Skála liðið er nógv meiri samanspælt, enn liðið hjá B68 er tað. Tá ið tað onkra løtuna gjørdist ov óruddu-ligt, so hevði Skála sítt grundspæl at detta aftur á. Bólturin varð spældur aftur á vøllin og tvørturum, og tá ið teir royndu at mynda álop, so tóktust spælararnir væl vita, hvat tað gekk út uppá og harvið, hvussu álopini skuldu byggjast upp, og hvat skuldi spyrjast burturúr.

Arnhold Berg er vorðin rættuligur lyklaspælari í miðverjuni, og á sentrala miðvøllinum er liðformaðurin Pauli G. Hansen sera stúttur. Ofta ber tað vandamiklar støður við sær, tá ið tað verður skift langt og neyvt frá vongverjunum báðum, Bárði Danielsen og Iulian Florescu, Alexandur Johansen og eisini Hanus Thorleifsson eru skjótir og tryggir í borðunum, og liðið verður eyka vandamikið, tá ið teir hava tveir sovornar hvirluvindar á toppinum, sum Jónleif Frederiksberg og Bogi Gregersen eru.

Dusan Jaic í miðverjuni og Nenad Stankovic tykjast vera góður fongur, og teir, sum komu inn av beinkinum, tóktist uppsettir at vísa, at tað altíð kann loysa seg at geva teimum møguleikan.

### Bogi aftur tvær ferðir

Hjá tí, sum liggur undir, raka mistøk eyka meint. Fyrsta málið hjá skálamonnum var dømi um hetta. B68 var á veg í álop, tá ið teir mistu í vinstru. Skálamenn gjørdu skjótt av og spældu innfyri til miðvallaran í vinstru, Alexandur Johansen, sum var blankur, áðrenn B68 aftur hevði funnið røttu støðurnar í verjuni, sendi millum beinini á málverjanum og so var 1-0.

So var tað, at Bogi Gregersen enn eina ferð skoraði tvey mál. Tjúgu minuttir eftir fyrsta málið og tveir minuttir undan steðginum økti hann til 2-0. Mortan Hansen hálvbjargaði roynd hjá Jónhardi Frederiksberg, og Bogi var fyrstur á returinum. Miðskeiðis í 2. hálvleiki smekkaði Bogi Gregersen umvegistvørtræið í málið. Eftir hornasparksinnlegg úr vinstru frá Nenad og afturum handara stólpan, varð spælt út frá og so var 3-0 og greitt, at øll stigini skuldu á Skála. Í síðstu sekundunum skoraði Nenad til 4-0.

## FAKTA UM DYSTIN

**B68-Skála 0-4 (0-2)**
0-1: Alexandur Johansen 23.
0-2: Bogi Gregersen 43.
0-3: Bogi Gregersen 67.
0-4: Nenad Stankovic 90.
**Dómari:** Oddmar Andreasen
**B68:** Mortan Hansen — Oleif Joensen, Herbert í Lon Jacobsen, Kári Sigvardsen, Jákup Eli Olsen — Bogi Petersen (Jóhan Dávur Højgaard, 78.), Mikkjal Thomassen (Alex Troleis, 45.), Øssur Hansen, Eyðstein Skipanes — Jóhan Petur Poulsen, Øssur Jacobsen
**Gult kort:**
**Skála:** Igor Kostic — Bárður Danielsen (Ronni Hansen, 80.), Dusan Jaic, Arnhold Berg, Iulian Florescu — Hanus Thorleifsson, Pauli G. Hansen, Nenad Stankovic, Alexandur Johansen (Rúni Rasmussen, 80.) — Bogi Gregersen (Eugen Stanciu, 80.), Jónhard Frederiksberg
**Gult kort:** Bogi Gregersen

## Hálvfinalur á skránni

Sunnudagin verða fyrru hálvfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið leiktar.

Í Gundadali kemur VB fyri triðju ferð í ár á vitjan, og eftir at teir í fjórðingsfinaluni sendu B36 úr kappingini, eru tað hesaferð HB, sum tekur ímóti. Dagfinn Olsen verður dómari í dystinum.

Hin hálvfinalan stendur millum eysturoyarliðini bæði, NSÍ og ÍF. Fyrra uppgerðin teirra millum er í Runavík, og verður tað Lassin Isaksen, sum fer at døma hendan dystin.

**-jm**

## Jones sóknast eftir liðfeløgunum

Tá ÍF í 1979 fyri higartil einastu ferð gjørdist føroyameistari í fótbólti, var ein av leikarnum á liðnum bretski David Jones.

Nú 25 ár eru liðin, síðani søguliga heitið kom til høldar, er David Jones farin at sókinast eftir teimum, sum hann tá var á liði saman við.

Hetta hevur hann gjørt umvegis eitt sonevnt forum á alnetinum, har føroyskur fótbóltur er eitt av evnunum. Higartil eru tað ikki so nógv, sum hava svarað fyrispurningi hansara, men hann sigur seg gleðiliga taka ímóti góðum orðum frá øllum fótbóltshugaðum føroyingum.

Slóðin til kjakforumið um føroyskan fótbólt er http://www.network54.com/Forum/26970, og til ber eisini at senda David teldupost á davey_jones54@hotmail.com.

**-jm**